# SKELKANDI STAÐFESTING
# Koppsett børn hava 453% størri sannlíkindir fyri at menna heilaskaðar - staðfestir vísindalig kanning framd av Henry Ford Health




Egnu dátur hjá ***Henry Ford Health*** vísa á eina ógvusliga heilsugjá millum koppsett og ikki koppsett børn. Kanningin er ongantíð áður almannakunngjørd. Informed Consent Action Network (ICAN) og Del Bigtree geva út heimildarfilm við heitinum "***An Inconvenient Study***", 3. oktober 2025, fyri soleiðis at varpa ljós á hesar fjaldu sannleikar.

Talan er um eina skelkandi kanning, sum varð løgd fram herfyri undir eiðsváttan í amerikanska Senatinum. Kanningin váttar tað, sum nógv foreldur hava óttast í nógv ár, - koppsett børn hava nógv størri sannlíkindir fyri at menna varandi sjúkur og heilaskaðar samanborið við ikki-koppsett børn.

Løgfrøðingurin Aaron Siri legði fram fyri »Permanent Subcommittee on Investigations« í Senatinum, úrslitini frá størstu kanning framd í USA, sum fevndi um 10 føðiárgangir, har koppsett og ikki-koppsett børn verða samanborin.

Henry Ford Health kanningin, framd av Dr. Marcus J. Zervos, MD, fylgdi 18.468 børnum frá føðing, og í tíggju ár fram, við tølum frá elektroniskum sjúkraskráðum, sum verður vektað sum hægsta støði fyri veruligar heilsudátur.

**Skelkandi úrslit**
Úrslitini eru skelkandi, har koppsett børn høvdu: **453%** øktan títtleika fyri nervasjúkufrøðiligum menningarórógvi, harímillum børn sum høvdu **228%** øktan títtleika fyri menningartarn og **347%** øktan títtleika fyri talubrek.

Somuleiðis høvdu koppsettu børnini **496%** øktan títtleika fyri autoimmunum sjúkum**, 329%** øktan títtleika fyri astma, og **203%** øktan títtleika fyri »atopiska sjúku«, har immunskipanin yvirreagerar óneyðugt, tó als eingin vandi er á ferð, – samanborið við ikki-koppsett børn.

Enn meira ræðandi er økti títtleikin fyri sjúkur so sum ADHD, lesi-/læruavbjóðingum, menningarskaðar, tics og heilafunksjónsvansar, sum als ikki varð staðfest millum ikki-koppsett børn, men hinvegin vanligar millum koppsett børn.

Eftir tíggju ár høvdu **57%** av koppsettum børnum minst ein varandi heilsutrupulleika, – ofta fleiri. Hjá ikki-koppsettum børnum var talan um **17%**.

Heilsukurvan (survival curve/sundhedskurven), sum lýsir heilsustøðuna hjá koppsettum og ikki-koppsettum børnum, gevur eina greiða mynd av, at tey ikki koppsettu børnini hava betur heilsu alt lívsskeiðið.

Henry Ford Health-kanningin kann gerast tann týdningarmiklasta koppsetingartrygdarkanningin nakrantíð, nú hon verður gjørd almenn.

**Tilburðirnir hava rópt til himmals í áratíggju**
Eins og við tubbaksroyking, har 40 ár gingu áðrenn staðfest varð, at royking var heilsuskaðilig, so er støðan júst tann sama kring barnakoppsetingar, har tvíhildið eru um, frá almennari síðu, at koppsetingar eru fullkomiliga tryggar.

Tó ógvuslig øking er farin fram, av nærum ókendum barnasjúkum seinastu 45 árini, har hesar hava rópt til himmals um at orsøkin verður funnin til ræðandi gongdina, so er tað fyrst nú at hol veruliga er sett á svullin. Tað er tí at vóna, at MEGD og foreldur í felag taka um endan, og fremja tað Heilsuverkið og politiska skipanin ikki vilja taka hond um.

Nú ber ikki til longur at dylja sannleikan, - ræðandi tølini lýsa ein annan veruleika, og hava gjørt tað í sera mong ár, men er tilvitað tagt burtur, – og foreldur kunnu heldur ikki loyva sær longur, at venda blinda eygað til, at børn teirra gerast sjúk og verða skadd.

Autisma, menningartarn og kroniskar sjúkur eru í stórum vøkstri, – og prógvini hava víst á ein greiðan mun millum koppsett og ikki-koppsett børn alt tíðarskeiðið.

**Eitt sjúkt barn er ein góð íløga**
Heilivágsídnaðurin fíggjar øll lið í ketuni til verjuleysað barnið, tá tað loysir seg fíggjarliga, har Heilsuverkið og politiska skipanin sita kúrr og hyggja at. Fíggingin fevnir um Gransking, Menning av heilivági, Virkisvirknið, Kanningarfrágreiðing, Peer Review frágreiðing, Góðkenningarstovn, Lýsingar- og søluátak, Menning av protokoll til Heilsuverkið at nýta, - og fíggjar somuleiðis umhvørvið sum skipar fyri málrættaðari útbúgving av læknum, sum tænir Heilivágsídnaðinum, har avlærdir læknar nýta mentar protokollir, so heilivágur verður nýttur til allar avbjóðingar, og har heilsurøkt tilvitað er skúgvað heilt út úr frálæruni, - tó heilsurøkt annars skal fylla 90%+, og sjúkrarøkt 10%-, í einum vælvirkandi Heilsuverki. Í dag tosa vit um 100% sjúkrarøkt.

Somuleiðis er, fult tilvitað, eingin frálæra í hvørji evnir eru í einstøku koppsetingini, og hvørjir vandar eru knýttir at teimum, ikki minst í sambandi við »koppsetingar coctails«, har fleiri koppsetingar eru í somu sproytu, umframt, sum álagt í Sundhedsloven, hvørji heilsugóð ráð skulu veitast foreldrum, ynskja tey ikki at koppseta barnið.

Einstakir kendir læknar, umframt læknafelagsskapir, hava í fleiri ár larmað um hvussu Heilivágsídnaðinum hevur fingið fult vald á øllum liðum til verjuleysað barnið. Kendi bretski hjartalækning Assem Malhotra, sum hevur verið nýttur sum ráðgevi hjá bretsku stjórnuni, og sum ráðgevi í bretskum fjølmiðlum, málber seg soleiðis um álvarsomu støðuna:
*»Í dag er ikki møguligt hjá reiðuligum læknum at virka á heiðurligan hátt í yrki sínum, tá vit hava eitt syndrað heilsurøktarumhvørvi. Vit hava eina umfarsótt av feilkunnaðum læknum, har avleiðingin er feilkunnaðir og skaddir sjúklingar«!*

Ment er soleiðis vinnugrein millum tær mest lønandi í heiminum! Heilsumálaráðharrin í USA, Robert F. Kennedy sigur soleiðis - Í dag gevur eingin íløga størri vinning enn ein íløga í eitt sjúkt barn!

HHS/Robert F. Kennedy hevur annars boða frá, at HHS vil koma við einari frágreiðin í september mánaða 2025, sum lýsir orsøkirnar til ógvusliga vøksturin av autismu.

Hippocrates.fo
15.09.2025